# Fimm meistarar til Italia

Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari, hevur nú sett nøvn á teir 19 spælararnar, sum skulu við fótbóltslandsliðnum til Italia, har útidystur móti heimsmeistarunum er á skránni. Og tað sæst aftur, at runavíkingar høvdu eitt gott fótbóltsár. Ikki færri enn fimm spælarar frá meistarunum eru nevnliga við á liðnum. Hópurin sær soleiðis út: Jákup Mikkelsen, Fróði Benjaminsen, Bergur Midjord, Hanus Thorleifsson B36, Andrew av Fløtum, Rógvi Jacobsen, Rókur av F. Jespersen HB, Christian Høgni Jacobsen, Hjalgrím Elttør, Jóhan Trost Davidsen, Einar Hansen, Óli Hansen NSÍ, René Tórgarð EB/Streymur, Pauli Hansen Skála, Súni Olsen, Jón Rói Jacobsen Aab, Atli Danielsen Frem, Christian L. Holst, Tem Hansen Lyngby, Símun Samuelsen, Notodden.



# 80.000 áskoðarar við OL-leikvøllin í 2012

Olympiski leikvøllurin, sum skal verða klárur til leikirnar í London, í 2012 kemur at kosta slakar 5,5 miljardir danskar kr. Tað heilt serliga við leikvøllinum verður, at har verða 25.000 fastir stólar, meðan tað verða 55.000 stólar, sum kunnu avmonterast og pámonterast eftir tørvi. 80.000 áskoðarapláss verða undir OL-leikunum, men aftaná leikirnar verða møguleikar fyri, at smærri ítróttartiltøk kunnu fáa innivist á OL-leikvøllinum. Tá er ætlanin at halda fasta kapasitetin uppá 25.000. Men verða stór tiltøk aftur á skránni, verða hinir 55.000 stólarnir pámonteraðir. Formaðurin fyri fyrireikingarnevndini fyri OL í London; gamli rennarin Sebastian Coe sigur: "at talan verður um ein nýggjan leikvøll, til eina nýggja tíð!"

Neistin-StÍF 29-23 (12-11):

# Neista-verjan avgjørdi



*Tá Neistin eftir steðgin fekk verjuna at rigga, megnaðu tær hjá StÍF als ikki at fylgja við*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Eina løtu riggaði kontra-spælið hjá Neistanum til fulnar, og skræddu tær seg leysar frá StÍF, sum annars hevði fylgt heilt væl við**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fyri tað nógva var ikki so sjónligt, at Neista-kvinnurnar í ár ætla sær leiklutin sum fremsti avbjóðarin hjá Stjørnuni. Á heimavølli vóru tær bláu greiðir favorittar móti StÍF, men fyrstu longu løtuna gekk sera striltið at staðfesta hetta.

StÍF, sum seinnu árini hevur arbeitt miðvíst við at menna sínar egnu, heldur enn at satsa útlendskt, megnaði væl at byrgja fyri spælinum hjá heimaliðnum. Og við spælarum sum Rebekku og Ninnu hevur StÍF eisini nakrar av teimum dygdunum, sum kunnu trýsta neyðugu málini inn.

Fyrstu løtuna eftir steðgin skrædnaði dysturin tó. Neistin fekk veruliga verjuna upp at koyra hesa løtuna. StÍF megnaði als ikki at spæla tung, og sæð burtur frá skotstyrkini hjá Rebekku, var hóttanin móti bláa málinum tí lítil og eingin. Og so lá brádliga heilt væl fyri hjá Neistanum at spæla vandamikla kontra-spælið. Neyvu útkøstini frá Fríðu Petersen vórðu fleiri ferðir á rað umsett til mál, og eftir átta minuttum stóð 19-13 á talvuni.

Eftir hetta dovnaði Neistin aftur nakað, men tað høvdu tær so eisini ráð til. Spenningur kom í øllum førum ikki aftur í dystin, og so kundu tær bláu halda fast í ætlanunum um at vinna Stjørnuna aftur.

## FAKTA

**Neistin-StÍF 29-23 (12-11)**
**Málskjúttar**
**Neistin:** Nicoleta Hansen 8(1), Rakul Magnussen 5(1), Unn Kragesteen 5, Anja Heinadóttir 4, Katrin á Neystabø 2, Ása á Neystabø 2, Ása Christiansen 1, Elin Stakksund 1, Anna Clementsen 1
**StÍF:** Ninna K. Johansen 8(1), Rebekka Justinussen 7(1), Rósa Johansen 3, Oddrun Danielsen 2, Jóhanna í Króki 1, Bára B. Danielsen 1, Ata Gregersen 1
**Brotskøst:** Neistin 2, StÍF 2
**Útvísingar:** Neistin 3, StÍF 2
**Dómarar:** Rúni Mohr og Ragnar Simonsen

# Politiskt órógv ímillum Espanyol og FC Barcelona

**Í Espanyol eru tey í øðini um ein DVD-film, sum lokala katalanska tingið hevur givið út. Spanskur fótbóltur er enn einaferð fongdur av politikki.**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heri@sosialurin.fo*

Eins og í Føroyum eru bæði samríkisfólk og fullveldisfólk í Katalonia. Men størsti munurin er, at í Føroyum eru tey spjødd í øllum ítróttarfeløgum. Her, eins og í hinum norðanlondinum, hevur tað sjáldan politiskan týdning hvøsjum ein stuðlar í ítrótti. Í Barcelona er tað hópin meiri politiskt litaað, hvørt ein heldur við Espanyol ella við FC Barcelona. Tey flestu samríkisfólkini halda við Espanyol, meðan tey flestu fullveldisfólkini halda við FC Barcelona. Franco helt við Real Madrid, og tað hevur eisini gjørt sítt. Í Spania er eisini vanligt, at feløgini eisini hava lið í hondbólti, kurvabólti o.ø. liðítrótti. Tað hevur verið friðarligt ímillum Espanyol og FC Barcelona síðstu mongu árini. Tey hava tikið síni tøk á vøllinum, men ikki nøkur nevniverd tøk uttanfyri vøllin. Men nú hevur ein DVD-filmur elvt til politiskt órógv ímillum tey bæði stóru fótbóltsfeløgini í Barcelona.

## Bara Barca

Lokala tingið í Katalania, sum nevnist La Generalitat hevur framleitt ein DVD-film, sum favoriserar FC Barcelona. DVD-filmurin er framleiddur til børnini hjá innflytarum, sum eru fluttir til Katalania. DVD-filmurin er partur av einum sonevndum "integrasjóns-pakka", sum skal læra teir ungu tilflytarnar um teirra nýggja heimland; Katalonia, og fyri at læra tey um katalansk samfelagsviðurskifti. Filmurin er bygdur upp rundan um eina barnateknirøð, sum er væl kend í Katalania. Talan er um teir sonevndu "Les Tres Bessones", sum tosa til hvønn annan í sera barnsligum vendingum, um tey týdningarmestu støðini, og teir týdningarmestu persónarnir í Katalania. Og svarini hjá Tres Bessones eru: "FC Barcelona", "Ronaldinho", og so nevna teir nøvnini á nøkrum kendum bygningum, og nøkrum kendum mentannarfólkum í Katalonia. Á DVD-filminum sær ein eisini Tres Bessones ílætnir Barca-búnar leika fótbólt á Camp Nou. Ongastaðni í filminum nevna tekniróðsfigurarnir hitt felagið í Barcelona; Espanyol við einum orði.

## Forsetin óður

Espanyol-forsetin; Daniel Sanchez-Llibre er sera óður um hetta. "DVD-filmurin minnir meiri um eina lýsing frá einari ávísari upptøku, heldur enn ein undirvísingar-DVD. Filmurin vísir ikki tann fulla sannleikan um Katalonia!" sigur Espanyol-forsetin avgjørdur! Sanchez-Llibre hevur sett seg í samband við katalanska tingið, og lokala ráðharran í skúlamálum; Ernest Maragell. Og hevur Espanyol-forsetin biðið Maragell um at taka DVD-filmin aftur. Ella í ringasta føri, um at broyta innihaldið, so tað fæst ein javnvág í boðskapin. Og tað ljóðar, at katalanska tingið nú ætlar at broyta innihaldið á DVD-filminum, so Tres Bessones eisini fara at nevna tað minna fótbóltsfelagið í Barcelona; Espanyol. Bólturin er ikki bara rundur í Katalonia!